# ítróttur

Nr. 114 • fríggjadagur • 18. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Dystir fríggjadagin**

17.00 Bulgaria-Danmark
19.45 Italia-Svøríki

# NSÍ kærir KÍ fyri UEFA

**NSÍ vil ikki finna seg í, at klaksvíkingar hava boðið Esbjerg til venjingardyst undan inter-toto dystinum millum NSÍ og Esbjerg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Vit vilja ikki finna okkum í, at KÍ soleiðis fer aftur um okkara rygg, og blandar seg beinleiðis inn í okkara tiltak.

Somikið bersøgin er NSÍ-formaðurin, Jákup Mortensen, sum undan fráferðini hjá NSÍ til Esbjerg orðaði eitt hvast skriv, sum varð stílað til Fótbóltssamband Føroya, KÍ og Esbjerg.

Orsøkin til øðina hjá formanninum skal finnast í Klaksvík. Har hevur KÍ nevnliga gjørt av, at teir vilja bjóða Esbjerg til vinardyst, nú Esbjerg kortini er í Føroyum á vitjan hjá NSÍ. Nakað sum í øllum førum má metast sum eitt sera óvanligt stig. Ikki minst tí KÍ á henda hátt hjálpir Esbjerg í teirra fyrireikingum til Inter-toto dystin móti NSÍ.

– Fyrstu ferð eg hoyrdi um hetta var umvegis telefon tíðliga í seinasta viku. Akkurát tá sat eg á fundi, og hugsaði kanska ikki so nógv um tað. Seinni ringdi eg so norður til KÍ, har eg segði við teir, at hetta bar als ikki til, og at teir máttu avlýsa tiltakið.



*Nú er tað ikki bert á vøllinum, at NSÍ og KÍ stríðast*
*Savnsmynd*

– Eg hoyrdi einki aftur frá teimum, og so roknaði eg bara við, at tað málið var úti av verðini, sigur Jákup.

### Undir lágmark

Hetta helt sær tó ikki longur, enn til seinasta fríggjadag. Tá var Norðlýsið í luftini á Rás2, og her staðfestu umboð fyri KÍ, at teir hava boðið Esbjerg til venjingardyst, og at hesin verður leiktur 23. juni.

– Tá fleyg øðin í meg. Eg ringdi beint til Gest Hovgaard (KÍ-formaður, blðm., og segði honum, at hetta funnu vit okkum ikki í. Samstundis segði eg við hann, at eg vildi hava hetta málið avklára mikudagin, áðrenn vit fóru niður, men enn havi eg so einki hoyrt, sigur NSÍ-formaðurin, sum hósdagin fór til Danmarkar saman við restini av ferðalagnum hjá NSÍ.

– Eg má bara siga, at eg haldi hetta vera langt undir alt lágmark. Tað er nakað, sum eitur sømiligheit, og tað má KÍ eisini fyrihalda seg til. Um teir fylla 100 ár ella ikki, eri eg akkurát líkaglaður um. Tað eru vit, sum hava vunnið rættin til at spæla móti Esbjerg, og KÍ skal so ikki blanda seg út í okkara tiltøk, og tað allar minsta var, um teir spurdu seg fyri her hjá okkum fyrst.

### Kæra KÍ

Tá evstamarkið, sum Jákup sjálvur hevði sett, var farið aftur um bak mikudagin, uttan at NSÍ hevði hoyrt nakað sum helst úr KÍ, sendi NSÍ eitt skriv, sum í fyrsta umfari verður sent FSF, KÍ og Esbjerg.

– Eg veit ikki, hvat víðari hendir í málinum, men tey í FSF, sum eg havi tosað við, tóktust nærum skelkað av hesum. Onkur helst fyri, at tað mátti vera skemt, men tað er so ramasti álvara.

– Og hvat Esbjerg ger, veit eg ikki. Eg havi so greitt teimum frá, hvussu hetta málið hevur koyrt, og so vóni eg, at teir síggja tað høpisleysa í hesum. Hvat nú, um teir seinni í kappingini fáa dyst móti Juventus, og FC Midtjylland bjóðar teimum til venjingardyst í Herning, so leikararnir skulu vera betri fyri til dystin móti Esbjerg? Nei, eg spyrji bara, tí sjálvandi hevði tað ongantíð komið upp á tal. Og um eitt danskt felag hevði gjørt soleiðis, so vildi talan verið um eitt ramaskríggj.

Undan fráferðini til Danmarkar hevði Jákup so heldur ikki hoyrt frá Esbjerg, men tað vónaði hann so, at teir fóru at gera.

### UEFA verður kunnað

Og at enda skoytir NSÍ formaðurin so uppí, at teir eisini fara at kunna UEFA um málið.

– Enn er brævið so bert skrivað á føroyskum og donskum, men vit gera so eisini eina enska útgávu, sum verður send UEFA. Har plaga tey vanliga at appelera til, at fótbólturin skal vera við til at byggja upp vinarlag, men her hendir so tað júst øvuta. Tú byggir so ikki brýr, við at ganga aftur um bakið á fólki.

– Akkurát, hvat UEFA ger við málið, havi eg so ikki ánilsi, men eg vóni í øllum førum, at KÍ verður átalað fyri atburðin, og eg vóni so sanniliga eisini, at FSF fer at hava sínar viðmerkingar um hetta.

Í øllum førum er ikki nakað, sum eitur vinarlag millum okkum og KÍ. Teir eru farnir langt undir tað, sum kann kallast vanlig sámiligheit, og teir kunnu so gott spara sær at bjóða okkum í nakran føðingardag, sigur ein argur Jákup Mortensen at enda.

# Vit hava einki skeivt gjørt

**Formaðurin í KÍ, Gestur Hovgaard, dugir ikki at síggja, at KÍ hevur stungið NSÍ í ryggin við at bjóða Esbjerg til dyst í Klaksvík fáar dagar undan Inter-Toto Cup dystinum millum NSÍ og Esbjerg**

FÓTBÓLTSÓSEMJA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Aðrastaðnis á síðuni langar formaðurin í NSÍ, Jákup Mortensen, harðliga út eftir Klaksvíkar Ítróttarfelag í sambandi við, at KI hevur bjóðað KÍ til dyst í Klaksvík tann 23. juni, tá ið Esbjerg kortini er í Føroyum í sambandi við Inter-Toto dyst móti NSÍ. Jákup Mortensen er í øðini um, at KÍ blandar seg inn í teirra tiltak, men tað dugir Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, ikki at skilja.

### Vit hava kunnað NSÍ

Gestur Hovgaard sigur, at avtalan við Esbjerg bleiv gjørd fyri nøkrum vikum síðani, men at klaksvíkingar í hálvtannað ár hava arbeitt við at fáa eina avtalu í lag um ein vinardyst. Í farnu viku kunnaði KÍ eisini NSÍ um, at teir høvdu bjóðað Esbjerg til Klaksvíkar, og at danska felagið hevði tikið av innbjóðingini. Hetta fall ikki í góða jørð hjá formanninum í NSÍ, men Gestur Hovgaard sigur, at hann kann ikki taka sær av, hvat teir halda í NSÍ. Eftir at formaðurin í NSÍ hevði ringt til Gest og greitt frá, at teir vóru stak ónøgdir við ætlanirnar hjá KÍ, hevði fótbóltsnevndin í KÍ fund um málið, og tey dugdu ikki at síggja nakran trupulleika við at spæla vinardyst móti Esbjerg í Klaksvík, greiðir Gestur Hovgaard frá.

At danska liðið skal blíva betri fyri til dystin móti NSÍ við at spæla venjingardyst móti KÍ í Føroyum fáar dagar frammanundan, dugir Gestur Hovgaard heldur ikki at síggja.

– Vit hava einki skeivt gjørt, og vit taka heldur ikki fokus frá NSÍ. Neyvan verða tað færri dystin hjá NSÍ, tí eg trúgvi ikki, at nakrir klaksvíkingar høvdu ætlað sær til tann dystin, sigur Gestur Hovgaard, sum ikki missur svøvnin av, at NSÍ hevur gjørt av at klaga KÌ fyri FSF og UEFA.

*Formaðurin í KÍ, Gestur Hovgaard, heldur ikki, at klaksvíkingar hava stungið NSÍ í ryggin*
*Savnsmynd*





# Grikkar sita við trumfinum

**Eftir at hava fingið javnleik móti sponsku favrittunum mikudagin, eru tað grikkar, ið hava bestu kortini á hondini undan seinastu dystirnar í bólkinum**

EM-ENDASPÆL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Neyvan hevði nakar spátt, at tað fóru at verða grikkar, ið komu at liggja best fyri undan seinasta leikumfarinum í bólki A, men hetta er nú veruleiki.

### Spaniólar høvdu yvirvág

Mikudagin leiktu grikkar móti Spania, sum teir eisini vóru í bólki saman við í undankappingini til EM, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Spaniólar sótu á tí mesta allan dystin, og tað var eisini í tráð við dystargongdina, at altíð vandamikli Fernando Morientes legði Spania á odda 1-0, tá ið ein hálvur tími var leiktur.

Hendan støðan helt sær eisini nakað út í seinna hálvleik, men so fekk Angelos Charisteas hjá Grikkalandi fatur á einari langari sending, og hann beindi bóltin undir Iker Casillas í spanska málinum, og so var 1-1. Spaniólar trýstu óført síðstu løtuna, og hóast teir helst høvdu uppiborið betur, noyddust teir at taka til takkar við einum 1-1 javnleiki.

### Uppreisn fyri portugisar

Seinni mikukvøldið leiktu EM-vertirnir Portugál ímóti Russlandi á Estadio da Luz, og hjá heimaliðnum var uppgávan greið, tí vann Portugál ikki dystin, vóru teir útslignir. Portugisisku vertirnir fingu eisini eina dreymabyrjan, tí longu aftaná sjey minuttir eydnaðist tað Porto-leikaranum, Maniche, at skora til 1-0. Móti endanum av fyrra hálvleiki gjørdust útlitini hjá russum heldur ikki betur, tí at málverji teirra, Ovchinikov, varð rikin av vølli fyri at taka bóltin við hondini uttan fyri brotsteigin. Ein ivasom avgerð av norska dómaranum, Terje Hauge, og russiski málverjin var sera ónøgdur við avgerðina.

Í seinna hálvleiki megnaði Portugál ikki at trýsta russar so nógv sum væntað, og tað var ikki fyrr enn ímóti endanum av dystinum, at sigurin hjá portugisum bleiv staðfestur. Milan-stjørnan, Rui Costa, sum hesaferð var vrakaður til fyrimuns fyri Deco, bleiv skiftur inn, og móti endanum av dystinum sendi hann Christiano Ronaldo avstað í vinstru síðu, og Manchester United leikarin sendi eitt gott innlegg, og Rui Costa, sum var komin heilt inn í málteigin, setti fótin á, og so var 2-0 til heimaliðið. Eitt sera gott mál.

### Grikkar hava nokk við javnleiki

Við úrslitunum mikudagin hava grikkar spælt seg í eina sera góða støðu, áðrenn seinastu dystirnir í bólkinum verða leiktir sunnudagin. Grikkaland skal tá leika ímóti Russlandi, sum longu er útsligið, og um grikkar bert fáa ein javnleik, eru teir tryggjaðir víðari luttøku í EM-endaspælinum, og tað er rættuliga óvæntað. Hin dysturin sunnudagin er millum iberisku grannarnar, Spania og Portugál, og vinnarin av hesum dystinum er tryggjaður víðari luttøku. Um grikkar tapa móti russum, er ein møguleiki fyri, at bæði Spania og Portugal koma víðari, men so skal Portugál vinna dystin.

## EM-endaspælið í fótbólti

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Grikkaland | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 Spania | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 Portugal | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 Russland | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 3 | -3 | 0 |

# Abraham drúgva umtalu á heimasíðuni hjá UEFA

**Fyrrverandi landsliðsleikarin, Abraham Løkin, ið herfyri bleiv valdur til besta fótbóltsspælaran í Føroyum seinastu fimti árini, fekk fyrradagin drúgva umtalu á heimasíðuni hjá UEFA**

LANDSLIÐSKEMPUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá europeisku fótbóltssamgonguni UEFA, www.uefa.com, hevur tað í seinastuni verið vanligt, at UEFA hvønn dag setur ljóskastaran á eina fótbóltspersónligheit í Europa, og fyrradagin var fokus sett á okkara egna Abraham Løkin.

### Týdningarmiklasti áleyparin hjá føroyingum?

At tað var júst fyrradagin, at Abraham bleiv umrøddur av UEFA, var ikki av tilvild, tí henda dagin fylti Abraham 45 ár. Á heimasíðuni hjá UEFA stendur at lesa, hvørji feløg Abraham hevur leikt fyri, og harafturat stendur eitt sindur um hansara tíð á føroyska landsliðnum. Millum annað stendur, at hann var týdningarmiklasti áleyparin hjá føroyska landsliðnum, tá ið føroyingar fóru upp í altjóða fótbólt, av tí at hann megnaði at halda høvdið kalt, meðan liðfelagarnir høvdu tað trupult.

UEFA nevnir eisini, at Abraham sum 20 ára gamal var við til at vinna føroyameistaraheitið við ÍF fyri fyrstu og einastu ferð í søgu felagsins. Harafturat verður eitt sindur nevnt um, at Abraham leikti fyri OB, tá ið karrieran hjá honum var í hæddini. Venjarin hjá Abraham í OB, navnframi Richard Møller Nielsen, verður endurtikin fyri at hava sagt, at Abraham hevði kunnað komið væl longri við fótbóltinum, um ikki heilsutrupulleikar innan familjuna førdi við sær, at familjan valdi at flyta heim aftur til Føroyar.

## Benitez í Liverpool

Nú er tað endaliga greitt, at Rafael Benitez verður nýggjur venjari í enska felagnum Liverpool. Benitez hevur áður vant spanska meistaraliðið Valencia, men nú hevur hann gjørt ein fimm ára sáttmála við Liverpool.

– Eg eri sera, sera errin maður. Allir venjarar í Spania vilja verða í teimum bestu feløgunum, og vit vita, at Liverpool er eitt tað størsta felagið í øllum heiminum, sigur Benitez.

## Føroyingarnir taptu

Týskvøldið spældu teir tríggir føroysku landsliðsspælararin í Fremad Amager við á U21 liðnum hjá felagnum, sum var komið í finaluna B-landskappingini fyri tað eystara økið í Danmark.

Finaludysturin var ímóti Greve, og tað endaði við, at Greve vann 1-0. Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum og Jann Ingi Petersen spældu við allan dystin hjá Fremad Amager.

## Nú skulu grikkar taka av kjansinum

Otto Rehhagel, sum er landsliðsvenjari hjá Grikkalandi, heldur, at hansara spælarar nú skulu taka møguleikan, sum teir hava fyri at koma víðari úr bólkaspælinum í EM. Grikkaland spældi mikukvøldið javnleik ímóti Spania og skal nú bara hava javnleik í seinasta dystinum ímóti Russlandi fyri at koma í fjórðingsfinalurnar.

– Vit hava ein risa møguleika fyri at koma víðari, og hann skulu vit taka, segði Otto Rehhagel eftir dystin ímóti Spania, har grikkar ofta vóru undir trýsti.

– Teir spældu betri enn vit og trýstu nógv, men vit stríddust væl og tóku ein stóran kjans við at spæla við trimum álopsspælarum. Seinasta korterið av dystinum fingu vit nóg illa bóltin burtur úr verjuni, og tað mugu vit gera betri næstu ferð, segði týski landsliðsvenjarin hjá Grikkalandi.

## Venjarin tók ábyrgdina

Portugal megnaði í mikukvøldið at vinna 2-0 á Russlandi, og harvið hevur vertslandið fyri EM framvegis møguleikan at sleppa í fjórðingsfinalurnar.

Russland er hinvegin liðugt í hesi EM-kappingini og má heim eftir seinasta dystin í bólkaspælinum.

– Eg havi fullu ábyrgdina av úrslitunum hjá okkum, og eg fari ikki at geva spælarunum skyldina fyri nakað, segði russiski landsliðsvenjarin Georgi Yartsev eftir dystin mikukvøldið.

Portugisiski venjarin var hinvegin í betri lag eftir sigurin á 2-0.

– Alt liðið spældi væl. Nú skulu vit njóta sigurin og ikki hugsa ov nógv um, hvussu tað verður sunnudagin, segði Luis Felipe Scolari.

– Vit royna altíð at vinna, og tí er tað ikki nakað nýtt fyri okkum, at vit skulu vinna á Spania. Men teir hava eitt sera gott lið, sum tað ikki verður lætt at spæla ímóti, segði Scolari.

**-eyk**

# EM-KAPPINGIN

| 2. UMFAR | | | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bulgaria-Danmark | Bólkur C: | 18. juni kl. 17.00 | | | |
| Italia-Svøríki | Bólkur C: | 18. juni kl. 19.45 | | | |
| Letland-Týskland | Bólkur D: | 19. juni kl. 17.00 | | | |
| Holland-Kekkia | Bólkur D: | 19. juni kl. 19.45 | | | |
| Russland-Grikkaland | Bólkur A: | 20. juni kl. 19.45 | | | |
| Spania-Portugal | Bólkur A: | 20. juni kl. 19.45 | | | |
| Sveis-Frakland | Bólkur B: | 21. juni kl. 19.45 | | | |
| Kroatia-Ongland | Bólkur B: | 21. juni kl. 19.45 | | | |
| Italia-Bulgaria | Bólkur C: | 22. juni kl. 19.45 | | | |
| Danmark-Svøríki | Bólkur C: | 22. juni kl. 19.45 | | | |
| Týskland-Kekkia | Bólkur D: | 23. juni kl. 19.45 | | | |
| Holland-Letland | Bólkur D: | 23. juni kl. 19.45 | | | |

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn
Seðilin kann eisini latast inn hjá Kiosk Steinatún í Havn.
Seðilin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, 18. juni kl. 15.00

Fornavn ______________________

Eftirnavn ______________________

Føðingardagur ______________________

Lið nr: ______________________

Bústaður ______________________

Postnr. og staður ______________________

Sosialurin    Kiosk Steinatún